

www.oljan.fo

**Jan Müller** 30 - 05 - 2012

# Bretski orkumálaráðharrin í Íslandi

Í dag kemur bretski orkumálaráðharrin, Charles Hendry, til Íslands at vitja. Hann steðgar tveir dagar. Undir vitjanini fara Charles Hendy og íslendski ídnaðarmálaráðharrin, Oddný G. Harðardóttir, at skriva undir eina felags yvirlýsing viðvíkjandi orkumálum. Í yvirlýsingini staðfesta londini bæði, at tey ætla at samstarva, og at serligur dentur skal leggjast á varandi orkukeldur. Londini miðja eisini eftir at samstarva innan jarðhita og at menna jarðhitaverkætlanir í menningarlondunum. Í morgin fer bretski orkumálaráðharrin at halda røðu á einari ráðstevnu um orkumál. Ráðstevnan, sum er í Arionbankanum, snýr seg serliga um møguleikarnar hjá íslendskum fyritøkum á orkumarknaðunum í Evropa.